

*Fløgan hjá Teiti Lassen »Teitur –Poetry & Aeroplanes«kemur væntandi út í juni mánaði. Hetta er fyrsta fløgan, sum Teitur gevur út við plátufelagnum, Universal*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Eg meini tað eg syngi

**Teitur Lassen, sum í fjør undirskrivaði sáttmála við stóra plátufelagið, Universal, kemur í juni mánaði út við fyrstu fløguni. Hon hevur fingið heitið »Teitur - Poetry & Aeroplanes« og á henni eru 12 løg, sum øll eru á enskum**

**Fløguútgáva**
*Ingrid Bjarnastein/ Jan Müller*

Í fjør kom fram, at Teitur Lassen, sum vit frá sínari tíð kenna frá Mark No Limits, hevði undirskrivað sáttmála við risastóra plátufelagið Universal.

Nú er fyrsta fløgan innspæld og verður hon væntandi klár at senda á marknaðin í juni mánaði. Fløgan hevur fingið heitið »Teitur – Poetry & Aeroplanes«.

– Eg havi verið í upptøkuhølunum frá august til november. Fløgan er nú øll innspæld, og tað hevur alt gingið fyri seg í Los Angeles og í Spania, sigur Teitur Lassen.

– Fløgan er eyðmerkt av einum sokallaðum singer/songwriterstíli, sum er fólkakendur tónleikur við eitt sindur av poppi. Fyri at nevna nakrar singer/songwriters, so kunnu vit taka, Joni Mitchell, James Taylor, Bob Dylan, Paul Simon og aðrar.

## Gjøgnumført evni

Løgini eru øll skrivað yvir tey seinastu tvey-trý árini. Nøkur av teimum hava verið spæld fyrr, men eisini eru nøkur, sum ongantíð hava verið at hoyrt áður. Men nøkur kenna kanska lagið »I was just thinking«, og er tað eitt av teimum tólv løgunum á fløguni.

– Løgini eru øll á enskum. Eg havi skrivað tey sjálvur, fleiri saman við øðrum sangskrivarum, vinmonnum og fólki, eg havi møtt ígjøgnum tíðina í Onglandi og USA, greiðir Teitur frá.

Orsøkina til heitið á fløguni sigur Teitur vera, at tá hann sat og valdi løg út til fløguna, so uppdagaði hann, at øll løgini høvdu nakað við »Poetry & Aeroplanes« at gera.

– Eg hugsaði ikki um tað áðrenn, men eg valdi so hetta heitið til fløguna, tí tað vísir seg at vera evnið ígjøgnum øll løgini. Hon er nógv um at ferðast, og eitt lag á henni eitur eisini soleiðis.

Fløgan kemur í fyrsta umfari út í USA og seinni kemur hon út í Evropa. Universal hevur bundið seg til at geva hana út í minst 14 landaøkjum. USA er eitt, Norðurlond eitt, Avstralia eitt, Japan, Frakland, Ongland við meira.

– Vit miða ímóti at fáa hana skjótt út í Føroyum, men nær tað verður, veit eg ikki at siga enn, sigur Teitur.

Byrjað verður við eini stakfløgu/single í umleið mei mánaði. Tá verður eitt einkult lag sent út, men enn kann alt broytast, tí onki er vist enn.

## Væl nøgdur

Teitur er sjálvur væl nøgdur við upptøkurnar, og hann gleðir seg at vita, hvussu fløgan verður móttikin.

– Plátufelagið er eisini væl nøgt við úrslitið. Hvat upptøkum viðvíkur hava tey givið mær og framleiðaranum, Rupert Hine, fríar teymar at framleiða tónleikin, uttan at teir blanda seg uppí, og í dag halda vit, at vit hava megnað uppgávuna sera væl, sigur Teitur.

Tá sáttmálin varð undirskrivaður í fjør, hoyrdist, at fyrsta fløgan skuldi koma út í mars mánaði. Men so er ikki. Fløgan er eitt sindur seinkað, og hon kemur tí væntandi ikki fyrr enn í juni.

– Vit valdu at spæla eitt lag inn umaftur, og er tað orsøkin til, at fløgan er seinkað, sigur Teitur.

## Meinar tað

Hví Teitur hevur megnað at fáa ein sáttmála við eitt so stórt plátufelag, dugir hann ikki sjálvur at siga.

– Kanska eg havi bjóðað okkurt, sum ongin annar hevur. Hetta slagið av tónleiki er eisini áhugavert júst nú, og eg havi verið ein partur av eini menning. Eg fekk ein góðan umboðsmann og eitt forlag, sum hevur stuðlað mær allan vegin og trúð uppá tað. Vit hava so bjóðað mítt tilfar fram, sigur Teitur, og greiðir víðari frá:

– Eg eri farin beinleiðis til nøkur heilt fá útvald fólk í plátufeløgum, har vit mettu um teir høvdu teir eginleikar, ið samsvaraðu við tað, sum vit vildu gera. Hetta eru míni løg og mítt tilfar, eg fari at spæla tað soleiðis, hetta eru fólkini, eg arbeiði saman við. Vilja tit vera við til at útgeva hendan tónleikin? Hetta havi eg gjørt ístaðin fyri at spæla konsertir og bíða til onkur púra fremmandur bjóðar seg fram, og fortelur tær, hvussu leikur skal fara fram. Eg haldi, at mín máti er betri grundarlag fyri einum góðum samstarvi júst í míni støðu. Eg hevði tó ikki væntað nakað samstarv við so stórar fyritøkur sum Universal.

Teitur sigur eisini, at júst hetta slagið av tónleiki fær stóran kommersiellan áhuga frá plátufeløgum, og tað er nýtt, og heldur hann, at ein slíkur sáttmáli hevði ikki kunnað verið veruleiki fyrinøkrum árum síðani, tí tá var tað ikki attraktivt.

Spurdur um, hvat tað er plátufelagið heldur fangar, sigur Teitur, at tað er helst heildin av øllum tónleikinum.

– Eg geri løg, sum eg framføri sjálvur á kassagittari, ið skal vera so øgiliga gott júst nú. Eg komi frá einum løgnum staði og eiti nakað so løgið sum Teitur, og eg skilji tónleikaslagið, sum eg ferðist sera væl í, haldi eg, sigur Teitur.

– Tónleikur er alt fyri meg. Tað er tað, sum eg skilji best og eg meini tað, eg syngi.

## Føroyar

Sjálvt um Teitur er føroyingur, so er tað ikki júst hetta, hann hevur brúkt til at marknaðarføra seg við. Tá samanborið verður við landsliðið, og at føroyingar eru stoltir av at hava ein Teit, sum fær ein altjóða sáttmála sigur hann:

– Sjálvandi er tað stuttligt hjá teimum sum hugsa soleiðis, men hetta er ikki beinleiðis nakað eg hugsi um. Men hinvegin, so tosi eg nógv um Føroyar, tá eg hitti fólk, og tey halda tað er ógvuliga løgið at hoyra um landið, málið og so framvegis.

– Fyri meg er tað soleiðis, at eg havi búð í Føroyum, har eg havi lurtað eftir tónleiki og gjørt tann tónleikin eg havi gjørt. Og eg eri eisini ofta í Føroyum, sigur Teitur.

Nú er so bara bíða eftir til fløgan »Teitur – Poetry & Aeroplanes« kemur á marknaðin. Teitur sigur annars, at um ikki so heilt langa tíð, so verður farið undir næstu fløguna. Nógvir sangir eru longu skrivaðir, so um eitt til tvey ár, gongur leiðin aftur í upptøkuhølini.

# 13. várframsýningin av bakkastokki

**Leygardagin fer 13. várframsýningin í Listaskálanum av bakkastokki. Við í ár eru 23 listarfólk, sum eru útvald millum 38. Tað er Myndlistafelagið, sum skipar fyri framsýningini**

**FRAMSÝNING**
*Ingrid Bjarnastein*

Leygardagin klokkan 15 verður fernisering í Listaskálanum í sambandi við 13. várframsýningina. Aldubáran skal spæla eina blásikvintett eftir Atla Petersen, og høvið verður at síggja alskyns list.

Heili 38 listarfólk sendu inn verk til várframsýningina í ár. Men bert 23 av teimum sluppu ígjøgnum nálareygað.

Myndlistafelagið skipar fyri framsýningini, og hava tey eina úttøkunevnd, sum skal velja út tey, ið sleppa við. Í úttøkunevndini sita Jóna Rasmussen, Amariel Norðoy og Kári Svensson.

Við á framsýningini er list av nógvum slagi. Talan er tó mest um málningar, men eisini eru grafikkur og standmyndir við.

## 4 nýggj

Við á várframsýningini í ár eru fýra, sum ongantíð hava verið við fyrr. Tey eru Osla Rannvá Svensson, Sámal Blak, Arndis Simonsen og Niels K. Jensen. Felags fyri hesi fýra er, at tey øll eru ógvuliga ung – undir 20 ár.

– Tey hava víst hegni, og prógvað, at vit kunnu taka tey við. Tey eru vísa orginalitet og tey hava nakað spennandi at vísa fram, sigur Kári Svensson, sum situr í úttøkunevndini.

Undanfarin ár hava tey í úttøkunevndini eisini sent inn verk fyri at sleppa at vera við á várframsýningini. Men í ár hevur nevndin valt at lata vera við hesum.

– Hetta hevur nakað við gegni at gera. Fólk halda, at ein er sjálvskrivaður, tí ein er við í úttøkunevndini, so vit hava øll trý valt at lata vera, og vit vóna, at tað fer at vera soleiðis framyvir, sigur Jóna Rasmussen.

Myndalistafelagið velur á aðalfundi einaferð um árið eina úttøkunevnd, sum skal finna listarverk til várframsýningina. Ein í úttøkunevndini verður skiftur út um árið.

Aldubáran skal eisini spæla tónleik. Sunleif Rasmussen sigur, at hetta er vorðið til ein afturvendandi tátt at nýggj list og nýggjur tónleikur verða víst fram samstundis, men tíverri hevur Aldubáran onga frumframførslu til várframsýningina í ár.

Sjálv várkonsertin verður í Listaskálanum leygardagin 1. mars klokkan 17 og sunnudagin 2. mars klokkan 14. Tónleikarar sum Kári Bæk, Kristian Blak, Edvard N. Debess og Atli Petersen verða at hoyra umframt Aldubáruna.

Talan verður eisini um eina flytiliga konsert. Eitt sindur verður roynt við tónleikaforminum, og verður konsertin flutt runt í øllum Listaskálanum.



*13. várframsýningin verður nú send av bakkastokki. Hon letur upp leygardagin við 23 ymsum listarfólkum, sum úttøkunevndin hevur valt. Úttøkunevndin her avmyndað í Listaskálanum: Jóna Rasmussen, Amariel Norðoy og Kári Svensson*

*Mynd: Jens Kr. Vang*